Landssjúkrahúsið
Fo 100 Tórshavn

# Fysioterapeutur til Landssjúkrahúsið

Søkt verður eftir fysioterapeuti til fysioterapideildina á Landssjúkrahúsinum frá 15. oktober 2005. Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna.

Málbólkurin er sjúklingar innlagdir á Landssjúkrahúsinum og vegleiðing av sjúklingum, sum koma ambulant á Landssjúkrahúsið til viðgerð og vegleiðing.

Fysioterapeutiska arbeiði á Landssjúkrahúsinum er at:

- Leggja til rættis, gjøgnumføra og samanhangandi eftirmeta málrættaða viðgerð og rehabiliterings upplegg í samstarv við brúkara, avvarandi og onnur starvsfólk.
- Kunna og vegleiða sjúklingin við tí endamáli at økja um hansara egna fysiska, psykiska og sociala tilfeingi. Hetta at fremja nýtsluna og menningina av tilfeinginum og at afturvinna ella betra um funktiónevni, førleikamøguleika og lívsvirði.
- Seta í verk tiltøk og hættir, sum ávirka kroppsligu støðuna hjá sjúklinginum, fyri gjøgnum hetta at betra um sálarligu/sinnisligu heilsustøðuna og sosiala virkisevni.
- Undirvísa og vegleiða starvsfólk á Landssjúkrahúsinum í fysioterapeutiskum kjarnuveitingum.

**Fysioterapideildin:**
Á fysioterapideildini eru 12,0 fulltíðarstørv. Yvirfysioterapeutur, deildarfysioterapeutur, fysioterapeutar og sjúkrahjálpari, tilsamans 15 fólk.

**Vit søkja eftir** einum fysioterapeuti við áhuga og kunnleika at arbeiða á sjúkrahúsi. Vit vænta, at tú ert ágrýtin, hevur góð samstarvsevni, er opin og er til reiðar at arbeiða neyvt saman við starvsfólkunum á heiliráðdeplinum.

Á Landssjúkrahúsinum verður í løtuni arbeitt við at broyta leiðslubygnaðin. Hetta ber í sær, at ergoterapideildin og fysioterapideildin verða ein rehabiliteringseind undir medisinsku depilsleiðsluni.

**Fleiri upplýsingar** um arbeiðstíðir, arbeiðsuppgávur o.a. fáast við at venda sær til Marjun Poulsen, yvirfysioterapeut ella Karin Djurhuus, deildarfysioterapeut, tlf. 304599, lok 5790.

**Løn- og setanartreytir** sambært sáttmála millum Fysioterapeufelag Føroya og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknarfreistin** er 5. oktober 2005 kl 12.00.
*Tað er umsøkjarans ábyrgd, at umsóknin er á Lønar- og starvsfólkadeildini áðrenn freistin er úti.*

**Skivlig umsókn,** merkt »umsókn til starv«, við avriti av prógvum og viðmælum skulu sendast til:

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og Starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna »starvsfólk«.*

Landssjúkrahúsið
Fo 100 Tórshavn

# Sjúkrarøktarfrøðingar ella Heilsurøktari/Pleygari

Á **D3** eru farloyvisstørv leys at søkja:

Talan er um 2 størv á starvsbrøk 0,5 í náttarvakt frá 15. oktober 2005 til og við 31. mars 2006.

D3 er ein stutt- og langtíðar psykiatrisk deild, har arbeitt verður eftir miljøterapeutiskum meginreglum og kontaktpersónsskipanini. Deildin er í støðugari menning, og starvast har sjúkrarøktarfrøðingar, pleygarar og almanna- og heilsuatstøðingar í tøttum samstarvi við aðrar fakbólkar.

**Krøv til umsøkjaran:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur ella heilsurøktari/pleygari
- góð samstarvsevni
- fakligan áhuga innan tað psykiatriska økið

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt dynamiskt, fjølbroytt og vinarligt arbeiðsumhvørvi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samarbeiði
- góða innleiðslu

**Løn og setanartreytir** smb. sáttmálan millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Nærri fæst at vita** um størvini við at ringja til Elsebeth Sørensen, deildarleiðara, telefon 30 45 00, lokal 4003 ella Bergit Weihe, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 4102, e-post: bergitw@lsh.fo

**Umsóknarfreistin** er 6. oktober 2005 kl. 12.00.
*Tað er umsøkjarans ábyrgd, at umsóknin er á Lønar- og starvsfólkadeildini áðrenn freistin er úti.*

**Skrivlig umsókn,** merkt »umsókn til starv« við avriti av prógvum, CV og viðmælum skal sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og Starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn

# Fast starv á Føroya Barnaheimi

Søkt verður eftir einum starvsfólki til Familjudeildina á Føroya Barnaheimi. Starvið ið er eitt fulltíðarstarv er leyst til setan frá 15.11.2005 ella skjótast til ber. Tann ið settur verður í starvið, skal starvast í skiftandi vaktum á Familjudeildini.

**Um Familjudeildina:**
Á Familjudeildini eru 7 fólk í starvi, øll við viðkomandi útbúgving.
Endamálið við arbeiðnum á Familjudeildini er, at foreldrini verða styrkt og stuðla í at vera foreldur, soleiðis at familjan kann virka betur sum ein heild. Eisini er endamálið at fáa greiðu á, hvørjar styrkir og hvørjar trupuleikar familjan hevur, og í hesum sambandi meta um, hvat slag av stuðli er best og mest viðkomandi at veita familjuni framyvir.

**Førleikakrøv:**
Vit sóknast eftir einum starvsfólki, ið hevur ávísan kunnleika til familjuarbeiði. Tað er umráðandi, at viðkomandi hevur fakligan áhuga og góð samstarvsevnir. Tann ið settur verður, skal kunna arbeiða sjálvsstøðugt.
Ein partur av arbeiðnum er skriftligt arbeiði, og viðkomandi má tí vera góður at málbera seg skriftligt.

**Útbúgving:**
Fyrimun hevur umsøkjari sum hevur útbúgving sum pedagogur, sosialráðgevi, sjúkrasystir, fysioterapeutur ella ergoterapeutur. Ynskiligt hevði verið, um viðkomandi somuleiðis hevur eina terapeutiska eftirútbúgving.

**Løn:**
Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Um umsøkjari við aðrari útbúgving enn teim omanfyri nevndu fær starvið, verður viðkomandi løntur eftir sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag fyri hjálparfólk.

Umsóknir við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 04.10.2005.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Hallbjørg Lamhauge, deildarleiðara ella Beintu Johannesen, leiðara á tlf. 312320

**Føroya Barnaheim**
Pedda við Steinsgøta 10
FO-100 Tórshavn


# Eysturoyingar

## Eysturoyar Teoriskúli

**Nýtt teoriskeið byrjar mikukvøldið 21. september kl. 19.00**

**Tilmelding hjá:**
**Hugo Kristiansen, tel 225225**

Hugo Kristiansen, tel 225225 · Ole Lykke, tel 220972 · Jari Lykke, tel 503002

Sosialurin 341800



**HEVUR TÚ EINA GÓÐA SØGU?**



Vikuskiftisvaktin hjá
SOSIALINUM & PORTALINUM
er at hitta alt vikuskiftið á
22 50 00

Ringið um tit hava søgur, hugskot og tips ella um tit vilja kunna um fundir, tiltøk, konsertir o.a., sum fer fram kring alt landið í vikuskiftinum

VIVA